28

# Útskrift

úr

# GERÐABÓK FYRI ÚTSKIFTINGINA

Pag. 2794-2795 og 2579-2583

Útskifting av Handastahaga
Sandavágs bygd

Fyri rætta útskift verður váttað.
Matrikulstovan, tann 18. juni 2002.
Øssur Á. Midjord

Ø Midjord

Syrg fyri at seta
bókina aftur á
pláss

Pag. 2794 Ár 2001 tann 4. okt. kl. 10.15 varð útskiftingarfundur settur í Vakhúsi í Sandavági at viðgera útskifting av matr. nr. 373c, Handastihagi.

Fram varð lagt:

Skjal nr. 1: Grannastevnuviðtøkan.

Skjal nr. 2: Landsstýrisins uppnevning av Øssur Á. Midjord til nevndarformann.

Skjal nr. 3: Sorinskrivarans uppnevning av Rasmus Skorheim, Selatrað og Jørleif Kúrberg, Tórshavn til nevndarlimir.

Skjal nr. 4: Lýsingar í Dimmalætting og Sosialinum 13. og 18. sept. 2001 og í kunngerðatalvuni.

Eingin mótmælti lýsingarháttinum. Formaðurin lýsti fundin at vera lógliga lýstan og settan.

Nevndin veit seg ikki vera so nær skyldan ella svágdan við nakran eigara, at hetta nervar teirra gegni.

Flemming Augustinussen upplýsti, at kona hansara er systkinabarn Rasmus Skorheim. Føroya jarðarráð hevði upplýst honum, at hetta ikki ger nevndarlimin ógegnigan.

Pag. 2795 Tá Rasmus Skorheim ikki er møttur, nervar hetta ikki nevndararbeiðið. Støða verður tikin til málið seinni.

Skjal nr. 5: Svenning Nielsen legði fram skrivligar viðmerkingar til býtið.

Tá avtalan við vágatunnilin ikki er greið, steðgar nevndin málinum, til partarnir hava gjørt eina greiða avtalu.

Fundurin løkin.

**Øssur Á. Midjord** **Jørleif Kúrberg**

Pag. 2579 Ár 2002 tann 12. juni kl. 10.15 varð útskiftingarfundur settur í Vakhúsi í Sandavági at viðgera útskifting av matr. nr. 373c, Handastihagi.

Fram varð lagt:

Skjal nr. 6: Lýsingar til fundin.

Eingin mótmælti lýsingarháttinum. Formaðurin lýsti fundin at vera lógliga lýstan og settan.

Gerðabókin pag. 2794-2795 varð lisin. Eingin gjørdi viðmerkingar til gerðabókina.

Á seinasta fundi varð spurningurin, um Rasmus Skorheim er ógegnigur, reistur. Sambært skjali nr. 3 „uppnevning av nevndarlimum" er Olaf í Garði Joensen, Eiði, boðsendur í staðin fyri Rasmus Skorheim.

Eingin viðmerking var um nýggja nevndarlimin.

Nevndin: Jørleif Kúrberg, Olaf í Garði Joensen og Øssur Midjord møttu allir. Frá Matrikulstovuni møtti Jógvan Frýdal. Um 13 eigarar vóru møttir.

Pag. 2580 Nevndin undirskrivaði soljóðandi váttan:

„At eg vil leggja mær eina við og óheftur útinna tær skyldur, ið liggja á mær sum útskiftingarnevndarlimur, tað vátti eg við hond míni undir trúnaðartreytum".

**Øssur Á. Midjord** **Olaf í Garði Joensen** **Jørleif Kúrberg**

Partarnir upplýstu, at teir eru um at verða samdir um mark.

Teir eru ikki samdir um býtið av ágóðum í sambandi við tunnilsgerðina.

Nevndin ásetir, at skiftið verður at fremja.

Svenning Nielsen legði fram skriv, skjal nr. 7, sum varð lisið upp.

Partarnir eru samdir um markið, víst við blýanti á skjali A 3/5-2002, við teirri treyt, at rættin er innan fyri mark. Tær 4 merkurnar vilja binda fíggjarliga býtið at hesum marki.

Pag. 2581 Upplýst verður, at markið skal vera umleið 30 m frá fjøruni, har rættin stendur, 35 m frá fjøruni, har marknalinjan verður brotin, og haðani í ánna minst 30 m frá gjáarbotninum.

Svenning Nielsen upplýsir, at ognin hjá haganum er um 250.000 kr., tá tað er gjørt, sum teir seta sum treyt fyri ávísta markið.

Jens Pauli á Lofti upplýsir, at ognin hjá haganum er um 410.000, tá tað, sum hann kann ganga við til, er gjørt.

Nevndin **ásetir**, at Handastihagi verður býttur soleiðis:

Reyn - 2 mk., 95 áseyð

| Matr. nr. | mk.gl.sk. |
|---|---|
| 133a | 01-08-00 |
| 134h | 00-02-10 |
| 72 | 00-01-00 |
| 283b | 00-00-15 |
| 285a | 00-03-15 |
| | 02-00-00 |

Syðriseyður - 4 mk., 210 áseyð

| Matr. nr. | mk.gl.sk. |
|---|---|
| 3b | 00-01-00 |
| 4a | 01-06-05 |
| 5b | 00-03-10 |
| 31a | 00-04-00 |
| 36 | 00-01-00 |
| 134a | 00-08-00 |
| 180 | 00-01-15 |
| 211a | 00-10-05 |
| 213b | 00-01-00 |
| 217a | 00-04-00 |
| 278 | 00-04-00 |
| 285a | 00-03-00 |
| 306 | 00-00-05 |
| | 04-00-00 |

Pag. 2582 Markið verður, sum lýst í skjali A.

Hagarnir hava øll rættindi inni á sær sjálvum, tó verður útraksturin og Skorarnar býttar eftir markatali.

Býtið verður framt, tá kærufreistin er úti.

Tá upp verður gjørt, skal Reyn hava 110.000 kr. úr felagskassanum.

Matrikulstovan førir roknskapin, og skal kostnaðurin býtast eftir markatalinum.

Møguligar kærur skulu vera skrivligar og stílast til Yvirútskiftingarnevndina, Sorinskrivarin, Tórshavn. Kærufreistin er 3 mánaðir frá í dag at rokna.

Upplýst var um kap 9 "Anke og Gennemsyn" í útskiftingarlógini.

Syðripartur hevur ferðslurætt eftir vegnum yvir Reyn.

Pag. 2583 Úrskurður: Útskiftingin verður latin til ákæru.

Fundurin lokin.

Útskiftingin endað.

Bókin lisin.

**Øssur Á. Midjord** **Olaf í Garði Joensen** **Jørleif Kúrberg**